

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 10 - 2012

# Mærsk Oil í samstarv í Grønlandi

Mærsk Oil hevur skrivað undir samstarvssáttmála við felagið Tullow Oil um samstarv í grønlendskum øki. Eftir avtaluni yvirtekur Tullow Oil 40 prosent av einum leitiloyvi, sum Mærsk Oil hevur úti fyri Vesturgrønlandi. Mærsk Oil er framvegis fyristøðufelag við 47,5 prosentum av loyvinum. Tey seinastu 12,5 prosentini eigur tað grønlendska Nunaoil. -Vit eru fegin um sáttmálan sum Tullow Oil. Frá teimum fáa vit vitan, samstundis vit býta váðan okkara millum, og okkara uppgáva er so at fremja ætlanina í verki, sigur Carsten Sønderskov, sum stendur á odda fyri virkseminum hjá Mærsk Oil í Grønlandi. Verkætlanin er á byrjunarstigi, tí tær fyrstu seismisku kanningarnar eru júst lidnar. Carsten Sønderskov sigur, at tá úrslitið av teimum seismisku kanningunum liggur á borðinum, verður støða tikin til, um farast skal undir at bora. -So vit tosa framvegis um ár, áðrenn nakað hendir, sigur hann.

